# Tað ringasta farið

Forsætisráðharrin í Luksenburg, Jean-Claude Juncker, sum eisini er formaður í Evruøkinum, heldur, at vinnulívið í evrulondunum er farið at ressast aftur, og at tað ringasta av búskaparkreppuni er farið afturum. Tað segði hann á fundi í Evropatinginum í Bruxelles í gjár. Hann ávaraði tó ímóti ov stórum bjartskygni og segði, at hóast tað gongur tann rætta vegin nú, skal lítið til, at støðan kann versna aftur. Harafturat er tað ein sannroynd, at støðan er ymisk frá landi til land, og at batin sæst seinni í summum londum, segði Juncker.



Hans Jacob:

# CHEF AID bjargaði mær



*Hans Jacob Garðalíð, kokkur*

**Nú nakað er liðið, síðani CHEF AID stuðulskonsertin varð hildin, er greitt, at Hans Jacob Garðalíð, við stuðli frá tónleikarunum, kann bjarga sínari fyritøku, hóast útlitini vóru døpur tíðina eftir festivalin.**

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

- Øll tann jaliga uppmerksomheitin hevur gjørt, at fólk hava fingið eyguni upp fyri mær, og mítt virksemi er eksploderað síðani tá, sigur Hans Jacob Garðalíð.

Eftir festivalin við Múrin bleiv greitt, at kokkurin, ið borðreiddi fyri tónleikarunum, var komin sera illa fyri.

Tá Sp/F Festivalur fór av knóranum, stóð Hans Jacob Garðalíð við einari skuld áljóðandi 100.000 krónur. Hetta tók hart uppá Hans Jacob Garðalíð og hansara fyritøku, og ivasamt var, um kokkurin fór at koma uppundan hesari skuld.

Men við stuðli frá tónleikarunum, sum spældu við Múrin, megnar Hans Jacob Garðalíð nú at sigla millum skerini, og bjarga sínari fyritøku.

Stuðulskonsertin CHEF AID megnaði at savna umleið 30.000 krónur til Hans Jacob Garðalíð, men eftirvirkningarnir av konsertini hava gjørt, at tær manglandi 70.000 krónurnar eru innkomnar.

- Fólk kring alt landið, sum áður ikki hava kent meg, vilja nú hava meg at gera mat til teirra. Og alt tað, sum er hent eftir CHEF AID, hevur bjargað mær, sigur Hans Jacob Garðalíð.

### Kennir seg priviligeraðan

Hans Jacob Garðalíð varð ikki sørt ovfarin, tá ið tónleikararnir skipaður fyri CHEF AID til heiðurs fyri honum. Og tíðin síðani hevur verið ein tann besta í lívinum hjá Hans Jacob.

- Eg kenni meg so hepnan og priviligeraðan. Eg eri so ótrúliga glaður og positivur fyri tíðina, og eg royni nú at spreiða eitt sindur av gleði har sum eg eri, soleiðis at eisini eg kann gleða onkran, sigur Hans Jacob Garðalíð.

Hans Jacob Garðalíð er nógv umbiðin hesar dagar, har hann nú eisini skal royna seg til ovurstórar veitslur og líknandi. Men hetta er bert ein jalig avbjóðing hjá kokkinum.

- Vit fara at klára okkum. Fyritøkan hjá mær er bara voksin síðan Múrin, og eg haldi nú, at vit eru til reiðar at klatra enn ein Múr, sigur Hans Jacob Garðalíð.

# Eros á íslendskum

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

»Vinaløg« er heitið á forkunnugu fløguni hjá Jógvani Hansen og Fríðriki Ómar, sum umboðar tað besta innan føroyskan og íslendskan tónleik. Fyri fyrstu ferð verða fólkakær føroysk løg sum Eros, Syngja Sama Lag, Tey Dansa Eins og Skuggar og fleiri onnur at hoyra á íslendskum.

- Tað var ótrúliga trupult at velja 10 tey bestu føroysku løgini. Tað er 1000 bestu løg í Føroyum, men eg havi so valt tey, sum hevur havt stóran týdning fyri meg gjøgnum tíðirnar, sigur Jógvan Hansen við Rás2.

Eisini verða 10 tey bestu úr íslendskum sangskatti at hoyra á føroyskum, tá ið Jógvan Hansen og Fríðrikur Ómar syngja tað besta frá teimum báðum mentanunum.

- Hetta er ein felagsverkætlan, sum eg og Fríðrikur Ómar hava sett saman. Hetta er sjálvandi eisini gjørt, tí føroyingar og íslendingar vanta kunning um tónleikin hjá hvørjum øðrum, so vónandi kann hetta betra um tað, sigur Jógvan Hansen við Rás2 í morgun.

### Fríðrikur kendur í Íslandi

Hóast føroyingar ikki kenna nógv til Fríðrik Ómar, so er hann kortini ein fólkakærur tónleikari í Íslandi. Millum annað hevur hann umboðað Ísland í Euro Vision Song Contest í 2007, tá ið Ísland fyri fyrstu ferð í langa tíð sang seg víðari frá undankappingunum.

Hóast hann bert er 27 ára gamal, so hevur hann tríggjar gullplátur. Hetta merkir, at hann hevur tríggjar fløgur, ið hava selt fleiri enn 5000 eintøk í Íslandi.

- Tað hevur verið ótrúliga stuttligt, at gjørt hesa fløguna saman við Fríðriki. Hann er ein ótrúliga dugnaligur tónleikari, og vit taka hetta sum ein heiður, at sleppa at kunna føroyingar og íslendingar um tónleikin hjá hvørjum øðrum, sigur Jógvan Hansen.

Fløgan "Vinaløg" kemur út í Íslandi 12. Oktober, og nakrar dagar seinni verður hon eisini at fáa í Føroyum.



*Jógvan Hansen*